Borgarar í Nes kommunu spyrja um skúlabygging:

# – Vit eru ørkymlað og kenna okkum ótrygg

**Borgarar, sum búgva í grannalagnum við skúlan á Toftum, hava vent sær til Nes kommunu við fleiri fyrispurningum, tí teir kenna seg ótrygg- ar og halda, at alt ov lítið er kunnað um umstøðurnar í sam- band við hesa ætlaðu út- og umbygging av skúlanum**

SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nes kommuna hevur stórar út- og umbyggingarætlanir við skúlanum á Toftum.

Ætlaða verkætlanin er rættiliga umfatandi, og hon er kostnaðarmikil. Tøl sum 47 miljónir krónur eru nevnd, og tað er eingin loyna, at hetta tal ørkymlar ein part av borgarunum í kommununi.

Men tað er eftir øllum at døma ikki bara kostnaðurin sum ørkymlar. Tað gera umstøðurnar rundan um byggingina eisini. Trongligt er suður og norður og verður neyðugt við spreinging og nógvari koyring, spyrja fólk, hvussu tey, sum búgva í grannalagnum uppat skúlanum, skulu fyrihalda sær undir hesum umstøðum. Vegurin niðanfyri skúlan er smalur og einsrættaður.

Nú ætlaða skúlabyggingin nærkast, hava Nicolina Lamhauge og Osla Gøthe vegna borgararnar í grannalagnum við skúlan sent Nes kommunu skriv, har tey ynskja svar upp á nakrar fyrispurningar.



*Borgarar í grannalagnum við Tofta skúla spyrja Nes kommunu, hvussu verður við útgrevstri - og um nógv spreinging verður á økinum í samband við byggingina. – Hvussu verður við okkara egnu trygd og okkara gomlu húsum, sum standa so tætt upp at byggiøkinum, spyrja borgararnir*

### Lítil kunning

Í skrivinum vísa Nicolina og Osla á kunnandi fundin, sum var í Tofta skúla í desember í fjør um ætlaðu út- og umbyggingina.

– Á hesum fundi fingu vit at vita, hvussu nýggi skúlabygningurin ætlandi kemur at síggja út – og at hesin eisini skal verða ein mentanardepil í bygdini. Men vit fingu einki at vita um, hvør ætlanin er fyri økið uttan um skúlan – um ferðslu, parkeringsviðurskifti og annað í hesum sambandi.

Borgararnir í grannalagnum ynskja tí, at kommunan svarar teimum upp á nakrar spurningar.

Í fyrsta lagi verður spurt, hvussu ein langtíðarætlan fyri økið sær út og í øðrum lagi, hvør frástøðan er til nærmasta granna hjá almennum bygningum.

Spurt verður eisini, hvussu ætlanin er at skipa ferðsluna til og frá skúlanum.

Í fjórða lagi vilja borgararnir hava at vita, um hædd er tikin fyri, at ein mentanardepil skapar órógv seint á kvøldi – og í hesum sambandi verður eitt nú hugsað um eldrasambýlið, sum júst er bygt beint niðanfyri skúlan.

– Kunnu vit her á Mørkini rokna við at sita mitt í eini rundkoyring áðrenn langt um líður?

At enda verður spurt, hvussu verður við útgrevstri – og um nógv spreinging verður á økinum í samband við byggingina.

– Her hugsa vit um okkara egnu trygd og okkara gomlu hús, sum standa so tætt upp at byggiøkinum, siga borgararnir.

### Ótryggleiki

Í brævinum til Nes kommunu siga Nicolina og Osla, at fólk í grannalagnum við skúlan kenna seg ótrygg og vita ikki, um tey eru keypt ella seld í øllum hesum.

– Vit hava búð í einum byggiøki nú í fleiri ár og kenna okkum rættiliga ørkymlað, nú kommunan aftur fyrireikar nýggjar útbyggingar.

Í skrivinum halda tær báðar, at alt ov lítið hevur verið kunnað um nevndu viðurskifti og vilja tær tí vegnar borgararnar í grannalagnum við skúlan mótmæla mannagongdini í málinum.

– Vegna grannalagið ynskja vit skjóta og jaliga viðgerð og svar upp á hesar fyrispurningar, siga tær báðar, Nicolina Lamhauge og Osla Gøthe, at enda í skrivinum til kommununa.

Brævið til Nes kommunu varð sent seinasta sunnukvøld, men í gjár, tá ið vit frættu, vistu umrøddu borgarar ikki, um kommunan hevði viðgjørt skrivið.

# Fara at kunna grannalagið við skúlan

**– Tað er altíð ein spurningur um, nær kunningin er nóg mikil – og kanska er hon ongantíð tað, men vit fara at kunna grannarnar við skúlan um, hvussu arbeiði við skúlabyggingini fer at ganga fyri seg, sigur borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen**

SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, váttar, at hann hevur móttikið fyrispurningarnar, sum grannarnir við Tofta skúla hava sent kommununi.

– Eg havi fingið skrivið inn á borðið í dag, og vit fara at viðgera tað og umrøða, hvørt kunningin, sum borgararnir sipa til, hevur verið nóg mikil ella ikki.

Hann vísir á, at kommunan sjálvandi fer at kunna tey, sum búgva við skúlan, um tey halda, at tey vita ov lítið um, hvat fer at fara fram á økinum, tá ið byggingin fer í gongd.

– Tað er nokk einaferð soleiðis, at kunning ongantíð er nóg mikil, leggur hann aftrat.

Símun Johannesen sigur, at kommunan sjálvsagt hevur fólk at taka sær av tryggleikaspurninginum viðvíkjandi spreinging og øðrum.

– Sum vanligir borgarar hava vit neyvan so gott skil fyri spreingiarbeiði, men vit hava professionell fólk at taka sær av slíkum, og vit mugu eisini hava álit á, at tey vita, hvat tey gera.

Símun Johannesen leggur aftrat, at sjálvsagt verður hædd tikin fyri teimum umstøðum, sum eru á økinum við skúlan, tá ið arbeiðið fer í gongd.

## Um sigling og móttøku av ferðamannaskipum

**Mikukvøldið heldur Klaus Kiesewetter almennan fyrilestur í býráðssalinum hjá Runavíkar kommunu um sigling og móttøku av ferðamannaskipum**

FYRILESTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mikukvøldið, 16. februar klokkan 20, verður almennur fyrilestur í býráðssalinum hjá Runavíkar kommunu. Fyrilestrarhaldari verður Klaus Kiesewetter, ið dagliga starvast sum »freelance referent og ekspeditiónsleiðari« umborð á ferðamannaskipum og rannsóknarskipum.

Klaus arbeiðir um allan heim, tó mest í arktisku og antarktisku økjunum.

– Hann hevur eina breiða vitan um sigling og móttøku av ferðamannaskipum, og hann hevur neyvt samband við reiðaríir og fyriskiparar av »cruise-ferðum«.

Kunningarstovan í Saltangará veit at siga, at Klaus eitt nú hevur siglt við tveimum skipum, sum ætlandi koma at vitja á Skálafjørðinum í summar.

Eftir fyrilesturin í býráðssalinum verður høvi at seta spurningar og annars røða um evnið, sum Klaus Kiesewetter fer at tosa um.